

## HALLÓ



**Peder Haahr,**
stjóri á Royndarstøðini í Kollafirði

**Hvussu er seyðurin fyri, nú ið flettingin er fyri?**
- Eg vil siga, at støðan sum heild er miðal. Summastaðni er vektin betri, og aðrastaðni er hon minni enn miðal. Og tá er líkamikið, hvar í landinum vit eru.

**Hvat er miðalvektin í ár?**
- Tey minstu lombini eru komin niður í 25-26 pund, og tey størstu upp í 37-38 pund. Onnur ár hevur miðalvektin ligið um 30-31, men í ár er tað líkasum farið meiri í bæði borð.

**Hví er tað so?**
- Onkur hevur sagt, at tað var kaldari í summar, enn tað hevur verið onnur ár. Men eg haldi ikki, at summarið var kaldari enn vanligt. Tað var kanska ikki so nógv sól, sum men kundi ynskt sær. Hinvegin var heldur kalt um mánaðarskiftið apríl-mai, sum kanska ikki var so heppið, tí hetta var í lembingartíðini. Tað var kortini nóg mikið av grasi, og tí hevði eg væntað eina vekt, ið lá nakað yvir miðal. Men sum tað sær út nú, fer hon at liggja um miðal.

**Hvussu er støðan í grannalondum okkara?**
- Í Danmark er miðalvektin á lombunum nakað hægri enn hjá okkum. Hetta kemur fyrst og fremst av, at ærnar lemba fyrri enn her og at tað hendir inni. Tí fáa lombini har mangan eina betri byrjan, enn her á landi.

snorri@sosialurin.fo

# NÝTT FELAG BJÓÐAR UNDIRHALD

Í dag fer eitt nýtt føroyskt booking felag av bakkastokki. Talan er um Tónleikur.fo, sum umboðar fleiri av kendastu nøvnum innan føroyskan tónleik og undirhald. Felagið er tað fyrsta av sínum slag í Føroyum.

- Beint nú eru fyrispurningar eftir tónleiki og undirhaldi til jólaborðhald. Men annars bjóða vit eitt breitt úrval av tónleiki og undirhaldi til firmaveitslur, móttøkur, ráðstevnur, ferniseringar, brúdleyp, føðingardagar, konsertir, festivalar, stevnur, og øll sløg av privatum veitslum, sigur Elin Hentze, sum er dagligur leiðari av Tónleikur.fo.

Á heimasíðuni hjá Tónleikur.fo er eitt yvirlit yvir tey listafólkini, sum felagið umboðar. Har eru bæði konsertnøvn, dansibólkar, DJ's, VJ's, og undirhald til vaksin og børn. Umframt myndir og tekstir, eru eisini sangir og sjónbandaløg við teimum ymisku listafólkunum. Visiónin við heimasíðuni er at samla útboðið av tónleiki og undirhaldi á einum stað, so tað er lætt at finna hjá fyriskiparum av tiltøkum.

- Fyrimunirnir við at bíleggja gjøgnum okkum eru millum annað, at vit gera sáttmála við kunda og listafólk. Vit hava yvirlit yvir nógv listafólk, og vita hvør er tøkur, ella kunna bjóða okkurt tilsvarandi, sigur Elin Hentze.




## Í MORGIN




Gul til stívt andøvsgul av vestri og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 8 og 11 stig.

## FRÍGGJADAGIN




Gul til stívt andøvsgul av útnyrðingi og ælingnur, men seinnapartin minni vindur av norð og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 7 og 10 stig.

## LEYGARDAGIN




Um morgunin lot til andøvsgul av útsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar, men sum fráliður veksur hann vindin upp í stívt andøvsgul og regn. Hitin millum 9 og 12 stig.

**Veðrið sunnudagin og mánadagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av útsynningi og ælingur men onkur sólglotti. Hitin millum 9 og 13 stig.

## LUFTTRÝSTIÐ




**Síðstu nátt:**
Eitt hátrýst, 1025 hPa. yvir Skotlandi fer í útsynning. Eitt lágtrýst, 997 hPa. við Hvarvið fer í landnyrðing.




**Koamdi nátt:**
Lágtrýstið yvir Grønlandsfjørðinum fer spakuliga eystureftir og brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum hósdagin.

## HITALAG




## AVFALL




Miðal: 94 mm



**Petur Skeel Jacobsen** greiðir frá um veðrið

### Hitalagið kring knøttin

| | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Nuuk** | 5 | **Tromsø** | 6 | **Moskva** | 16 | **Athen** | 26 |
| **Reykjavík** | 11 | **Bergen** | 12 | **Berlin** | 25 | **Beijing** | 30 |
| **Tórshavn** | 10 | **Oslo** | 22 | **Paris** | 20 | **New Dehli** | 30 |
| **Lerwick** | 9 | **Stokkhólm** | 20 | **Madrid** | 28 | **Bangkok** | 34 |
| **Aberdeen** | 12 | **Keypmannah.** | 19 | **Róm** | 26 | **Sydney** | 14 |
| **London** | 19 | **Helsinki** | 16 | **Malorca** | 26 | **New York** | 33 |

## VESTFALLSKYRRINDI

| | |
|---|---|
| 6. okt | Mánin næstur jørðini |
| 7. okt | Tendring |
| 14. okt | Fyrra kvarter |
| 18. okt | Mánin longst frá jørðini |

Kelda. Álmanakkin 2010

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 13. okt. | 11:53 | - | 10:53 | 23:19 | 11:08 | 23:34 | 01:27 | 13:53 | 02:27 | 14:53 | 10:08 | 22:34 | 09:08 | 21:34 | - | 12:08 | 00:42 | 13:08 | 11:38 | - | 00:27 | 12:53 |
| 14. okt. | 00:19 | 12:57 | 11:57 | - | - | 12:12 | 02:19 | 14:57 | 03:19 | 15:57 | 11:12 | 23:50 | 10:12 | 22:50 | 00:34 | 13:12 | 01:34 | 14:12 | 00:04 | 12:42 | 01:19 | 13:57 |
| 15. okt. | 01:35 | 14:12 | 00:35 | 13:12 | 00:50 | 13:27 | 03:35 | 16:12 | 04:35 | 17:12 | - | 12:27 | 11:27 | - | 01:50 | 14:27 | 02:50 | 15:27 | 01:20 | 13:57 | 02:35 | 15:12 |
| 16. okt. | 02:49 | 15:10 | 01:49 | 14:10 | 02:04 | 14:25 | 04:49 | 17:10 | 05:49 | 18:10 | 01:04 | 13:25 | 00:04 | 12:25 | 03:04 | 15:25 | 04:04 | 16:25 | 02:34 | 14:55 | 03:49 | 16:10 |
| 17. okt. | 03:32 | 15:52 | 02:32 | 14:52 | 02:47 | 15:07 | 05:32 | 17:52 | 06:32 | 18:52 | 01:47 | 14:07 | 00:47 | 13:07 | 03:47 | 16:07 | 04:47 | 17:07 | 03:17 | 15:37 | 04:32 | 16:52 |